# Nógvir spyrja um kjans

**Sonny Johannesen, skipari á Ennibergi, sigur, at tað er ikki dagur, har fleiri mans ringja og spyrja um kjans við skipinum, og fleiri lata hoyra, hvussu trupul teirra fíggjarliga støða er**

Vilmund Jacobsen

Manningartalið við Ennibergi á flakaveiði liggur um 38. Hetta verður manningin, tá skipið loysir aftur um eina viku ella so og væntandi fer í Barentshavið at fiska.

Sonny Johannesen, skipari, sigur, at umleið 44 mans tilsamans eru knýttir at skipinum, men allir kunnu ikki verða umborð í senni.

- Nú vit fara í Barentshavið noyðast eini 4-5 mans at vera heima, tí pláss er ikki fyri øllum í senn. Vit royna tó at skipa soleiðis fyri, at manningin hevur tjent umleið tað sama, tá árið er úti. Teir, sum noyðast at vera heima hendan túrin, sleppa so við aftur næsta túr í staðin, sigur skiparin.

**»…fleiri lata meg vita, hvussu truplar fíggjarligu umstøðurnar eru…**
SONNY JOHANNESEN

## Nógvir ringja

Sonny Johannesen sigur, at tað er ikki dagur, at fleiri mans ringja og spyrja um kjans við skipinum.

- Hetta eru serliga menn, sum hava verið á ísfiskaveiði undir Føroyum – og eisini menn, sum kanska áður hava verið onkran túrin við flakatrolara í Barentshavinum.

Skiparin sigur, at tað eru upp til fleiri, sum ringja um dagin.

- Fleiri lata meg vita, hvussu truplar fíggjarligu umstøðurnar eru.

Sonny skilir væl, at menn liggja fram við og vilja sleppa við einum skipi sum Enniberg, men tíverri noyðist hann at siga, at skipið er fullmannað.

## Gott ár í fjør

Enniberg hevði eins og hinir flakatrolararnir eitt gott ár í fjør.

Várið royndist serliga væl, og menn tjentu nógvan pening.

Nú er tað soleiðis, at tað er undantakið, at menn eru við á hvørjum túri gjøgnum eitt heilt ár.

- Onkur er heima í ein túr og onkur í tveir, sigur skiparin.

Sonny Johannesen vísir á, at maður, sum hevur verið við Ennibergi hvønn túr í 2010, hevur tjent einar 900.000 krónur.

- Hóast menn eru av skipinum í ein ella tveir túrar um árið, eru fortjenastan góð kortini, soleiðis sum gongdin hevur verið, sigur skiparin.



*Tað eru nógvir fiskimenn, sum kundu hugsað sær at verið við flakatrolara í hesum tíðum, nú fíggjarligu byrðarar kennast so tungar. – Fiskimenn, sum dagliga venda sær til mín, lata illa at, sigur Sonny Johannesen, skipari á Ennibergi*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Toskur tolir ymiskan sjóvarhita

**Hitabroytingar í havinum er ikki størsti trupulleikin hjá toski. Toskur ávirkast nevniliga minni av hita, enn áður hildið. Fiskiskapur, rovdýr og føði hava størri týdning fyri stovnin enn hiti**

Vilmund Jacobsen

Nú so nógv er frammi um veðurlagsbroytingar, hava granskarar kannað eftir, hvussu toskur ávirkast av ymiskum hita.

Tað er serliga við gýting, at hitabroytingar kunnu fáa sína ávirkan, tí allur toskur søkir á sjógv, sum liggur millum 1 og 8 stig, tá hann fer at gýta.

Ført hevur annars verið fram, at høgur sjóvarhiti drepur tosk í Skagerak. Men nú vísir nýggj gransking hjá DTU Aqua tað øvuta, nevniliga at toskur er rættiliga tolerantur við hita.

## Granskarar ovfarnir

Í eini verkætlan, sum DTU Aqua hevur verið við í, fingu 2000 toskar úr átta ymiskum stovnum ein nútímans hitamátara festan á seg. Í eitt ár máldi hitamátarin einaferð um tíman hitan í sjónum, har toskurin helt til. Granskarar gjørdust ovfarnir, tá tað vísti seg, at toskur livir í munandi heitari sjógvi enn áður hildið.

- Vit eru ovfarnir av, hvussu nógvum hita toskur kann liva í, og hvussu leingi hann er har, sigur Ken Haste Andersen, granskari hjá DTU Aqua.

Hann er ein av fýra granskarum, sum júst hava skrivað eina frágreiðing í tíðarritið, Marine Ecology Progress.

Toskurin úr hesum átta ymisku stovnunum er ymiskur. Nakrir fiskar hava svomið runt í næstan 20 hitastigum, meðan aðrir hava svomið í sjóvarhita, sum hevur ligið um frostmarkið. Hinvegin halda granskarar, at toskur, sum eitt nú livir í Norðsjónum í lutfalsliga heitum sjógvi, hevði doyð, um hann kom í sjógv, sum liggur um 1,5 stig.

*- Vit eru ovfarnir av, hvussu nógvum hita toskur kann liva í, og hvussu leingi hann er har, sigur Ken Haste Andersen, granskari hjá DTU Aqua*



Allur toskur, líkamikið hvørjum hita hann sum vaksin vanliga heldur sær í, søkir sjógv, sum liggur millum 1 og 8 stig, tá hann skal gýta.

- Tað merkir, at um økini, har toskurin gýtir, gerast minni og færri, verður fiskurin trýstur og hevur ein stóran trupulleika, sigur Ken Haste Andersen, granskari.

vilmund@sosialurin.fo